**Avtala um neyðtilbúgving í sambandi við arbeiðssteðg**

Fylgjandi verður lagt afturat stk. 3 í avtaluni um fráboðanarform og fráboðanarfreist:

Partarnir eru samdir um, at ein arbeiðssteðgur í ongum førum má seta lív og heilsu borgarans í vanda, og somuleiðis eigur ein arbeiðssteðgur heldur ikki at føra til, at stór samfelagslig virði fara fyri skeyti.

Tá arbeiðssteðgur kann seta lív, heilsu og samfelagsvirði í vanda, eiga nøkur starvsfólk tí at verða undantikin arbeiðssteðgi.

1. Leiðarar kunnu ikki fara í arbeiðssteðg.
2. Í mun til onnur størv metir leiðslan um og ger av í samráð við álitisfólkið, hvussu nógvum starvsfólki tørvur er á, sambært nr. 3 niðanfyri. Tá sáttmálin millum partarnar er uppsagdur, lata stovnsleiðslur Fíggjarmálaráðnum ein lista har ásett verður, hvørji starvsfólk verða undantikin møguligum arbeiðssteðgi. Fíggjarmálaráðið sendir skjølini víðari til Kost- og føðslufelagið, og í seinasta lagi 1 mánað innan sáttmálin gongur út, skal semja vera millum partarnar um, hvørji starvsfólk verða undantikin arbeiðssteðgi. .
3. Starvsfólk, ið eru undantikin arbeiðssteðgi, eiga bert at átaka sær tær neyðugu uppgávurnar. Endamálið er bert at forða fyri, at vandi ikki stendst fyri lívi, heilsu ella tapi av stórum samfelagsligum virðum. Starvsfólk mugu sostatt ikki átaka sær aðrar uppgávur.
4. Viðkomandi limir hjá Kost- og føðslufelagnum, sum fáa arbeiðsboð frá leiðsluni, hava skyldu til at fara til arbeiðis beinanvegin og at fylgja sáttmálanum, sum var galdandi, áðrenn arbeiðssteðgurin var lýstur.
5. Er Kost- og føðslufelagið ikki samt við eini avgerð hjá leiðsluni um, hvørji starvsfólk verða undantikin arbeiðssteðgi,, kann felagið leggja málið fyri eina nevnd, sum ger av, um undantakið er neyðugt fyri at tryggja, at lív og heilsa borgarans ikki verða sett í vanda, ella fyri at tryggja, at stór samfelagslig virði ikki fara fyri skeyti..
6. Nevndin verður mannað við trimum limum. Fíggjarmálaráðið velur ein lim, og Kost- og føðslufelagið velur ein lim. Hesir báðir limirnir velja síðani forfólkið. Forfólkið skal hava viðkomandi fakligt innlit og vera óheft. Til limirnir hava valt eitt forfólk, er forfólkið útnevnt av sorinskrivarinum.
7. Nevndin skal taka avgerð innan 24 tímar, eftir at áheitan sambært nr. 5 er komin frá Kost- og føðslufelagnum. Verður nevndin ikki samd, tekur forfólkið avgerð.
8. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna hvør sínum limi í nevndini. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna formanninum.
9. Ein avgerð sambært nr. 7 kann eftir arbeiðssteðgin leggjast fyri Fasta Gerðarætt.